gult cyan magenta svart

Tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
**Ítróttur:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Skilir veljarin ikki?

## *Oddagrein*

Áhugaverd úrslit vóru at síggja í veljarakanningini, sum SVF og Sosialurin hava latið gjørt. Lítil ivi tykist vera um, at føroyski veljarin tekur ikki undir við sokallaðu trumfunum hjá landsstýrinum á seinasta samráðingarfundi. Føroyingar brýggja seg ikki um, at ein triðji partur, sum eitt nú ST, kemur uppí samráðingarnar við donsku stjórnina. Tað var eisini, sum vit hava nevnt her á hesum stað, eitt sindur óheppið fyri Føroyar, at okkara landstýri sat og tosaði um ST, sum um talan var um hertøku ella ógerðir, ið vit kenna frá Balkan og aðrastaðni.

Uppaftur størri mótstøða var móti at nýta oljuinntøkur til afturbetaling av stuðuli frá Danmark í skiftistíðini útyvir tey fýra árini, ið danska stjórnin og fólkatingið ganga við til. Fýra út av fimm veljarum hildu lítið um hetta hugskotið hjá landsstýrinum, og átti hettar at fingið landstýrið at ásanna, at teir gjørdu eitt mistak. Landstýrið hevur ikki ásannað, at hetta var eitt mistak. Sambært Høgna Hoydal hevur veljarin ikki skilt uppskotið hjá teimum. Spurningurin er, um hettar ikki er ein rættiliga grov undirmeting av føroysku veljarnum, eisini tá hugsað verður um, at eingin samgonga hevur nýtt so nógv av skattgjaldarans peningi til at kunna veljaran um eina politiska ætlan sum hesa. Veljarin hevur ivaleyst skilt, at tað er stórur munur á at mótrokna í einum stuðuli tú fært, soleiðis at hann gerst minni ella fellir burtur, og so at fáa stuðulin fyrst, og so afturgjalda hann við oljuinntøkum sum veð. Fullveldisfortalararnir í samgonguni hava ein óvana, og tað er, at hvørja ferð veljaraskarin ella einstakir politiskir flokkar ganga ímóti samgonguni, so verður sagt, at ikki er nóg væl kunnað, ella hesi ikki hava skilt. Kann tað ikki hugsast, at fullveldisætlanin er væl skild, men at veljarin ikki tekur undir við henni, uttan eina órealistiska skiftistíð?

Høgni Hoydal tulkaði úrslitið soleiðis, at føroyingar hildu, at 15 ár var rímiligt. Hettar er ivaleyst ein yvirtulking. Eitt nú kann hugsast, at nógv fólk høvdu viljað fingið eina millión forerandi frá landinum, um tey vóru spurd, hóast tað ikki nýtist at merkja, at tey halda tað vera rímiligt, at tey fáa hana.

Tá hugt verður eftir atkvøðubýtinum millum flokkarnar, um eitt valúrslit var sum veljarakanningin, so verða Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin størstu flokkar, meðan Fólkaflokkurin gerst stóri taparin. Javnaðarflokkurin hevur eina afturgongd í mun til seinastu veljarakanning, men eina framgongd í mun til valið. Polariseringin millum loysing og samband er neyvan gagnlig fyri gerandisdagsmál í næstu framtíð. Hvussu er við heilsuverki, samferðslu, pensiónum og øðrum, tá so nógv orka fer til loysing samband spurningin.

Løgmaður og flokkur hansara tykjast taka hesa veljarakanning til eftirtektar og tosa um at fáa "ein sáttmála" heldur enn fullveldi. Trupulleikin er bert, at samgongan er farin niður at samráðast um fullveldi og ikki "ein sáttmála". Skal samráðast um "ein sáttmála", so má saðlast um.

***Sosialurin***

## Viðmerking:

# Nú melur fyri onkrum



Tað er ótrúðligt, hvat tjóðveldismenn fáa burturúr blokkstuðlinum.

- Hann skal falla burtur.
- Hann skal vara allar ævir.
- Hann skal spara dønum 20 milliardir.
- Avlopið hjá landskassanum stavar bara frá blokkinum.
- Blokkurin er rótin til alt ilt.

Og um skiftistíðina verður sagt, at blokkurin má varðveitast — jú longri áramál, jú betur.

Sambært Høgna Hoydal og Karsten Hansen, so stavar avlopið hjá landskassanum einans frá blokkstuðlinum. Landsstýrið boðar nú frá, at serligur grunnur skal gerast til at goyma hetta avlopið í.

**Avlop áðrenn allar rokningar eru goldnar**
Landsstýrið roknar við eini 600 milliónum krónum í avlopi í ár. Hetta tal hevur eisini verið serverað donsku stjórnini til samráðingarnar.

Men vit sum manna løgtingið vita, at tá eru avdrøg og eykajáttanir ikki tikin við. Eitt avlop kann sjálvandi bara roknast eftir at allar rokningar hjá landskassanum eru goldnar. Tí skal talið hjá landsstýrinum helst lækkast við umleið 300 milliónum krónum. Eisini er tað ein gáta, hvussu landsstýrið og tjóðveldismenn hava funnið út av, at avlopið júst stavar frá blokkinum, sum er ein rættiliga føst upphædd. Mær vitandi fara allar inntøkur samlaðar í landskassan, eisini blokkurin. Tí má tað heldur vera t. d. tann meirskatturin, sum er tikin frá Føroya fólki, ella gjøld, ella minni goldnar rentur til útlond, sum eru orsøkin til avlopið.

Hvør er frágreiðingin? Hevur Karsten Hansen kanska goymt teir donsku pengaseðlarnar til endamálið?

**Fellur burtur, men heldur kortini fram**
Høgni Hoydal brúkar í síni grundgeving fyri loysingini, at hann vil spara Danmark fyri at gjalda 20 milliardir krónur í blokkstuðli. Sambært honum og landsstýrinum kann Danmark sleppa bíligari, um danska stjórnin gongur við til eina 15 til 20 ára skiftistíð. Alternativið er, at Danmark rindar blokkstuðul til føroyingar í allar ævir, verður sagt.

Seinasti pástandurin frá Høgna Hoydal er, at blokkstuðulin dettur burtur undir øllum umstøðum. Hetta skal hann hava hoyrt undir samráðingunum. Løgmaður royndi seg eisini við hesi ligisøguni, beinleiðis í Sjónvarpi Føroya frá tíðindafundinum í Keypmannahavn. Hann bleiv beinanvegin rættaður av sjálvum Poul Nyrup Rasmussen, sum afturvísti pástandi løgmans so dyggiliga.

Her haltar í ólukkumát við próvførsluni. Blokkurin kann ikki bæði halda fram í allar ævir, og falla burtur.

**"Hensigten helliger midlet"**
"Hensigten" hjá landsstýrinum er so sólaklárt at máa støðið undan ríkisfelagsskapinum. Alt sum kann seta hann niður í virði skal brúkast út í odd og egg.

Strategurin veit væl, at sigur tú eini ósannindi nóg ofta, so fara fólk at trúgva teimum til endans.

**Edmund Joensen**

# Donsk olmussa bjarga loysingarsamgonguni



Nú stendur loysingarsamgongan aftur á einum vegamóti, eftir at teirra politiski málsetningur er fullkomuliga miseydnaður. Tey seinastu rópini gella nú um allar geilar, um at danir mugu geva okkum olmussu í 15 ár, um henda loysingarsamgonga skal hóra undan.

**Vilja nú hava olmussu**
Navnið olmussa, hava somu loysingarflokkar fyri mongum árum síðani givið ríkisstuðlinum, og ikki kann sigast, at hesin stuðul altíð hevur verið so høgt í metum millum loysingarflokkarnar.

Men nú er vent í holuni, tí nú vilja teir allir hava olmussu. Men í staðin fyri at viðganga, at talan her er um tað, sum teir fyrr kallaðu olmussu, so royna teir nú at skuldseta danir fyri bæði eitt og annað.

Í hesum er einki nýtt. Men hetta bøtir bara ikki um umdømið hjá hesum loysingarflokkum. Serliga ikki tá hugsað verður um, at teir hóast alt vilja hava tætt samband við danska kongshúsið.

**Fáa bert 4 ár**
At skiftistíðin einans verður 4 ár, er ikki nakað nýtt. Nú fara tað at verða 2 ár, síðani Poul Nyrup Rasmussen lat loysingarsamgonguna vita av hesum, og síðani tá hevur hann fleiri ferðir endurtikið seg sjálvan, at soleiðis verður. Men loysingarsamgongan hevur tann trupulleika, at hon vil ikki skilja Nyrup, hóast stórur meiriluti í danska fólkatinginum, stigar forsætisráðharran í hesum máli. Har verður sostatt ikki meira at heinta hjá loysingarsamgonguni.

**Landsstýrið má frá**
Tí metir undirritaði, at nú er stundin komin til handa, tá landsstýrisins miseydnaði politiski málsetningur fær ein enda. Tað gerst einans við at vit skjótast gjørligt sleppa til atkvøðuhølini, og fólkið harvið fær sett punktum fyri hesi samgongu, sum má leggja frá sær, so vit aftur fáa eina arbeiðsføra stjórn, og fólkið kann liva trygt í landinum.

**Andras Miðskarð**

# Minnast tey, ið doyðu í ferðsluni

## *Í morgin verður minningardagur teirra, sum farin eru í ferðsluni*

Tað er ein fyrireikingarbólkur við Inga Gunnarsson í Havn, sum stendur fyri tiltakinum. Fleiri stovnar, m. a. Ferðslutrygd, stuðla tiltakinum, eins og fleiri blómuhandlar fara at hava opið eina løtu sunnudagin.

Blómuhandlarnir fara at selja rímuliga bílig blómutyssi og onkur fer at selja t. d. hjørtu og krossar við turkaðum blómum o. ø.

Fyrireikingarbólkurin fer í so stóran mun sum møguligt at markera vanlukkustøð í meginøkinum við blómum sunnudagin.

Vónað verður at fáa so stóra undirtøku sum møguligt fyri tiltakinum, og heitt verður samstundis á fólk um at sýna tiltakinum stórsta ansni í ferðsluni sunnudagin.

Endamálið er eittans: At minnast tey farnu og við tiltakinum at eggja til stórsta umhugsni í dagligu ferðsluni.

# Tøkk

Vit takka øllum fyri sýnda samkenslu og stuðul í sambandi við jarðarferðina hjá høgt elskaðu dóttir okkara

**Annika Gulklett**
**Nólsoy**

sum so brádliga fór frá okkum.

*Eygu mega glitra*
*og muðurin hann lær*
*hylur tað, ið eingin sær.*

Tit kunnu eins og Annika stuðla »Hjálpsemi 2000« hjá Adventistasamkomuni, konto í føroysku peningastovnunum.

**Marita og Jens-Kjeld**

gult cyan magenta svart





*Tíðindamenninir í Rás 2, Óla Jákup Rólantsson og Sonne Smith. Støðin bjóðar seg nú fram sum kunningarmiðil hjá kommunum*
**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Rás 2 bjóðar kommunum umrøðu afturfyri pengar

*Rás 2 hevur biðið Havnar, Klaksvíkar og Runavíkar kommunur um fíggjarligan stuðul. Afturfyri bjóðar Rás 2 kommununum ókeypis lýsingar, umrøðu og beinleiðis sendingar frá býráðsfundum*

Eyðun Klakstein

Kappingarneytin hjá almenna Útvarpinum roynir nú at fáa stuðul frá nøkrum av stóru kommunum í landinum.

Í eini óvanligari umsókn til Havnar, Klaksvíkar og Runavíkar kommunu biður Rás 2 um fíggjarligan stuðul, og aftur fyri vil rásin lata kommunum ókeypis lýsingar, umrøðu og beinleiðis sendingar frá eitt nú býráðsfundum.

– Vit halda tað vera eitt gott hugskot, at kommunurnar lata okkum fíggjarligan stuðul, og afturfyri kunnu vit geva borgarunum í hesum kommunum eina betri kunning um kommunal viðurskifti, sigur Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2.

Tórshavnar kommuna hevur tikið best ímóti umsóknini frá Rás 2, og mánadagin verður felags fundur millum Rás 2 og fíggjarnevndina og mentanarnevndina hjá Tórshavnar býráð. Á hesum fundi skal umsóknin og eitt møguligt samstarv viðgerast.

Fleiri býráðslimir í Havn eru sinnaðir at royna samstarvið, men formaðurin í mentanevndini hjá Tórshavnar býráð er hart ímóti hugskotinum.

– Eg haldi, at tað er prinsipielt skeivt at lata einari privatari fyritøku stuðul, sigur Kaj Leo Johannesen.

**Eina krónur fyri hvønn borgara**
Rás 2 sendi umsóknina til Tórshavnar býráð 14. mars í ár, og síðani hava hinar báðar stóru kommunurnar eisini fingið eina umsókn.

Í umsókníni til Tórshavnar býráð skjýtur Rás 2 upp, at býráðið letur útvarpsrásini eina krónu í stuðli fyri hvønn borgara í kommununi – um mánaðin. Hetta svarar til góðar 16.000 krónur um mánaðin – ella næstan 200.000 krónur um árið.

Afturfyri skal Tórshavnar býráð fáa ókeypis lýsingar á Rás 2, og Rás 2 skal eisini binda seg til at umrøða tiltøk hjá kommununi umframt at senda beinleiðis frá býráðsfundum, tá onkur týðandi mál eru á skránni.

Bæði mentanarnevndin og fíggjarnevndin hjá Tórshavnar býráð hava síðani viðgjørt umsóknina. mentanarnevndin mælti 17. mai til, at umsitingin hjá Tórshavnar kommunu brúkar Rás 2 sum lýsingarmiðil á jøvnum føti við hinar miðlarnar.

22. juni var samband millum Rás 2 og formannin í fíggjarnevndini hjá Tórshavnar býráð, sum er Leivur Hansen, býráðsformaður, og mánadagin verður nýggjur fundur við Rás 2, har bæði fíggjarnevndin og mentanarnevndin vera til staðar.

– Tá fara vit at greiða býráðslimunum frá, hví vit halda at hetta samstarvið er eitt gott hugskot, sigur Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2.

**Ætla at brúka Rás 2 í valárinum**
Tað hevur ikki eydnast okkum at fingið fatur á Leivi Hansen, býráðsformanni í Havn, fyri at fáa eina viðmerking frá honum til umsóknina frá Rás 2.

Men vit hava tó skilt, at býráðsformaðurin – saman við øðrum býráðslimum – er sinnaður at umhugsa samstarvið við Rás 2.

Formaðurin í mentanarnevndini er tó ímóti hugskotinum.

– Hetta er eitt rættiliga prinsipielt mál, tí hvør verður næstur, tá vit hava játtað ein árligan stuðul til eina privata fyritøku í kommununi. Hinvegin haldi eg, at vit saktans kunnu brúka Rás 2 til ávísar uppgávur, men tá skulu vit venda okkum til teirra, og so skulu vit gjalda fyri tað ávísa arbeiðið, sigur Kaj Leo Johannesen.

– Tað tykist, sum onkrir av býráðslimunum síggja ein møguleika í at sleppa fram at á Rás 2, um býráðið játtar stuðul. Og hetta botnar helst í, at í ár er valár.

Kaj Leo Johannesen sigur, at hann sær ein stóran vanda fyri framman, um býráðið letur Rás 2 stuðul eftir tí umsókn, sum rásin er komin við.

– Tað kann ikki vera rætt, at vit skulu gjalda einum fjølmiðli fyri at koma á býráðsfund. Um vit ikki klára at lokka fjølmiðlarnar á býráðsfund, uttan at gjalda fyri tað, so eru vit litleysur sum politikarar, sigur formaðurin í mentanarnevndini hjá Tórshavnar býrað, sum ikki stillar uppaftur til valið í heyst.

**Sær ongan vanda**
Stjórin á Rás 2 sær stórar møguleikar í samstarvinum við kommunurnar.

– Vit fáa ongan almennan stuðul sum er, men tað hevði komið væl við hjá okkum, um onkrar av kommunum vildu stuðla okkum, samstundis sum vit syrgdu fyri, at borgararnir í kommununi vórðu betri kunnaðir um ymisk viðurskifti í kommununi, sigur Petur Jacobsen

– Eg stúri als ikki fyri, at vit skulu blíva misnýttir í politiskum samanhangi, sigur hann.

Rás 2, sum í løtuni hoyrist av nærum tveimum triðingum av fólkunum í Føroyum, livir útilokandi av inntøkum frá lýsingum og sponsorum.

Men mánadagin ætlar rásin at royna at sannføra býráðslimirnar í Havn um, at tað er eitt gott hugskot at stuðla rásini fíggjarliga.

Bilpakkar 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

4 fólk í bili

Danmark
Fráf. Tórshavn 1/9 8/9
Fráf. Hanstholm 19/8 26/8 2/9
Ferðist bíliga,
Tórshavn-Hanstholm
ella hinvegin
úr 775,- fyri hvønn

Noreg
Ferðist bíliga,
Tórshavn-Bergen
ella hinvegin
úr 480,- fyri hvønn

Hetland
Ferðist bíliga,
Tórshavn-Lerwick
ella hinvegin
úr 385,- fyri hvønn

Ísland
Fráf. Tórshavn 9/8 16/8 23/8 30/8
Fráf. Seyðisfjørður 24/8 31/8 7/9
Ferðist bíliga,
Tórshavn-Seyðisfjørður
ella hinvegin
úr 728,- fyri hvønn

Skotland
Ferðist bíliga,
Tórshavn-Hetland-Skotland
ella hinvegin
úr 1.273,- fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo